

*Skálaberg er á veg heim úr Barentshavinum við 650 tonsum av toski. Teir fóru avstað fyrst í septembur, og rokna við at verða klárir at fara avstað aftur seinast í hesum mánaðinum*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Skálaberg siglir heim

**Seinastu dagarnar hevur Skálaberg havt rokfiskiskap eystan fyri og er nú á veg heim av fyrsta túrinum í Barentshavinum**

FISKISKAPUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Um middagsleitið fyrradagin, fór Skálaberg at sigla heim við 650 tonsum av toski.

Umframt nakað av rundfrystum fiski og vanligum flaki, hava teir eisini framleitt smáar portiónir á 200 gramm.

Skálaberg fór avstað 2. septembur, við eru um 40 mans. Skipari henda túrin er Róðin Biskopstøð.

Væntandi verður farið avstað aftur 25. novembur. Skipari komandi túr verður Ólavur Biskopstøð.




Norðoyatunnilin:

# Ongin vegur aftur



*Bergur í Garði og David Reinert Hansen á staðnum, har setast skal á undirsjóvartunnilin Borðoyarmegin*

**Nú eru øll týdningarmikil pappír undirskrivað. Vit kenna prísin og vita nær arbeiðið verður liðugt. Søguligi sáttmálin millum P/F Norðoyatunnilin og byggitakaran Føroya Konsortium gjørdist veruleiki í skýmingini í Klaksvík mikudagin**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Steintór Rasmussen*
*Myndir: Báður Lydersen*

Tað mesta er sagt áður. Tøl og tíðarætlanir hava verið frammi fyrr. Og ikki var so nógv nýtt undir sólini, sum eisini fór í kav. Kortini var hetta ein stór og minnilig løta, nú alt er komið uppá pláss og tað er ein staðfestur veruleiki, at tað koyrast kann undir sjónum millum Borðoynna og Eysturoynna á sumri 2006.

### Stórt framstig

Tað var stjórin fyri Norðoyatunnilin Dávur Reinert Hansen, sum tók samanum verkætlanina á innbodnari samkomu í Skálanum í Klaksvík.

- Nú verður farið í holt við vegir, at spreingja, bora og elarbeiði. Men alt hevur sítt greiða endamál. Nevniliga at binda føroyingar saman, at betra um møguleikarnar hjá vinnulívinum og gera tað meira høgligt hjá øllum ferðandi.

Og sum ein skilti á framløguni so liggur alt arbeiðið í góðum hondum. Tað ganga einans smá trý ár, so kunnu alllir føroyingar síggja fram til eitt stórt framstig á samferðsluøkinum. Norðoyartunnilin verður bæði slættari og longri enn Vágatunnilin. Hann verður tryggur at koyra ígjøgnum og undir sjónum ber til at tosa í fartelefon og hoyra útvarp.

### Uttan Jógvan við Keldu

Hóast fyrrverandi borgmeistarin í Klaksvík, Jógvan við Keldu hevur verið ein av ídnastu forsprákarum fyri fasta sambandið um Leirvíksfjørð, so var hesin ikki at síggja millum innbodnu gestirnar í Skálanum mikudagin. Tað tóktist eitt sindur løgið, tí júst Jógvan við Keldu varð havdur á orði sum maðurin, sum fyri fleiri árum síðani gekk undan og trúði, at undirsjóvartunnil var besta framtíðar farleið fyri norðoyingar.

Orsøkin til hetta mundi vera at finna á einum heldur ófullfíggjaðum lista fyri innboðin til hátíðarløtuna. Hóast løgmaður Anfinnur Kallsberg og vinnumálaráðharrin Bjarni Djurholm nátúrliga vóru tilstaðar, so vóru tingmennirnir úr Norðoyggjum ikki umboðaðir og bert onkur hendinga býráðslimur í Klaksvík var afturat borgarstjóranum at síggja til samkomuna

Men umboðaðin var kortini nøktandi til, at sáttmálin kundi undirskrivast, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd. Byrjað verður at bora í Leirvík 18. desember og bert fáar mánaðir seinni eisini á Borðoyarvík.



*David Reinert Hansen vísir okkum staðið í Borðoyarvík, har tunnilin verður*





*Frá undirskrivingini av tí umleið 270 milliónа stóra sáttmálanum í Skálanum í Klaksvík mikudagin*

Koyrið við Maersk Air

Um tú hevur ein Maersk Air bannara á bakrútinum á bilitínum, kanst tú vinna ferðaseðlar til ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air. Drigið verður millum luttakararnar og tey hepnu kunnu vænta sær vitjan av Maersk Air. Hava tey tá bannaran á bilinum, vinna tey.

| | |
|---|---|
| 1. vinningur | 2 ferðaseðlar til eitt ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air umvegis Keypmannahavn. Til dømis Athen, París, Barcelona ella Milano |
| 2. vinningur | 2 ferðaseðlar til London |
| 3.–5. vinningur | 2 ferðaseðlar til Keypmannahavnar/Billund |
| 6.–10. vinningur | Ítróttartaska |

Vitja eisini okkara nýggja handil á www.maersk-air.fo

Tú kanst melda teg til og heinta bannaran á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn. Ella vit kunnu senda hann við postinum. Seinasta freist at melda seg til er 17. november 2003. Vinnararnir verða funnir síðst í desember 2003.
Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75

MAERSK AIR
It's got to be perfect